# t, at grind áður er deyð í Svínoy





*Grind í góðveðri á Svínoyarvík. Eina slíka mynd hevur eingin núlivandi sæð áður*

Hann sigur, at tá ið hvalurin á sinni gjørdi landgongd, var nokso nógv brim í Svínoy.

– Hann kom niðan gjøgnum eina møl, og eg leyp oman og skar hann á háls, sigur Jógvan.

## Spakir hvalir

Og leygardagin hendi tað so aftur, og aftur hesaferð var Jógvan Joensen við á støðni.

Tað var ein nátabátur, sum fann grindina á Svínoyarvík, og tað gekk væl at fáa fatur á henni.

Jógvan sigur, at teir høvdu bert ein sóknarongul niðri á støðni, men tað var eingin trupulleiki, tí hvalirnir vóru so spakir, at líkt varð til, at teir bíðaðu eftir tørni at vera tiknir, sum hann tekur til.

– Ja, tað hevði ikki verið stórt øðrvísi, um teir vóru tamir, leggur hann aftrat.

Ein lastbilur, sum er í oynni, hjálpti til at hála hvalirnar niðan frá, og alt gekk av tí besta.

Hann heldur, at teir fimm hvalirnir, sum vórðu býttir millum grindamenninar og bygdarfólkið annars, vóru millum 4 og 6 skinn hvør.

– Grindin kemur væl við, og nú so lítið fólk býr í oynni, hevur hvørt húskið fingið nógva grind. Vit eru glað fyri grindina. Vit hava kókað av henni, og hetta er óføra góð grind, sigur Jógvan.

## Ein er eldri

Jógvan Joensen er sum nevnt 81 ára gamalur. Hann er næst elsta fólkið í Svínoy. Eitt fólk er í oynni, sum er trý ár eldri enn hann.

Spurdur, hvat hann hevur fingist við gjøgnum lívið, sigur Jógvan, at hann var sjómaður og sigldi við trolara síni bestu ár.

– Pápi min, Jóannes, var bóndi, og vit høvdu ein 6 marka garð, sum tá var tann størsti í oynni. Festið bar einar 200 seyðir.

Jógvan Joensen vaks upp saman við kríatúrum, og hann var eini 35 ára gamalur, tá ið hann fór at fáast við garðin burtur av.



*Teir fegnast um góða fongin. Jógvan Joensen standur ytst til vinstru á myndini*



*Yngri og eldri hjálpast til at skera upp*